# Umhvørvisstovan søkir eftir fólki til deildina Vernd.

*Eitt starv sum umhvørvisviðgeri er leyst at søkja á deildini Vernd.*

**Arbeiðsøkið**
Starvið umfatar yvirhøvur mál innan karmarnar av umhvørvisverndarlóggávuni, serliga innan viðgerð av umhvørvisgóðkenningum.

Hetta merkir, at tú í tí dagliga kemur at arbeiða við at:
- gera uppskot til umhvørvisgóðkenningar
- røkja umhvørviseftirlit
- gera fakligar metingar av umhvørvisfrágreiðingum frá feløgunum
- fylgja við í altjóða gongdini innan umhvørvisvernd.

Tú kemur at arbeiða á deildini Vernd, sum fyrisitur lóggávu á umhvørvisøkinum. Uppgerð av umhvørvishagtølum og luttøka í umhvørvissamstarvi í norðurlendskum og altjóða høpi eru eisini partur av arbeiðinum. Á deildini starvast í løtuni fýra fólk

**Førleikar**
Starvið er sera fjølbroytt og er bæði fakliga og persónliga avbjóðandi. Skikkað til starvið eru tey, sum hava lokið prógv innan umhvørvistøkni, náttúruvísind, verkfrøði e.l.

Vit sóknast eftir einum fólki við áræði og framfýsni at náa settum málum, sum sær nýggjar arbeiðsuppgávur sum eina spennandi avbjóðing, kann arbeiða sjálvstøðugt, dugir væl at samstarva, hevur kunnleika til edv-skipanir og hevur góð evni til at samskifta við onnur, bæði í skrift og talu. Tað er ein fyrimunur, um umsøkjarin hevur royndir innan fyrisiting. Koyrikort til bil er ein treyt.

**Starvsmøguleikar**
Vit kunnu bjóða eitt spennandi starv í einum nýskipaðum stovni, nógv samstarv við starvsfelagar, góðar møguleikar fyri persónligari menning og sjálvstøðugum arbeiði.

**Setan**
Løn og setanartreytir eru sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Talan er um fast starv fulla tíð.

**Fyrispurningar**
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Jóhonnu Olsen, deildarleiðara á Vernd á telefon 34 24 42, ella Jákup Paula Joensen, stjóra.

Umsókn, saman við prógvum, CV o.l., skal verða Umhvørvisstovuni í hendi innan 27. mai 2008.

**Umhvørvisstovan**
Traðagøta 38, Postboks 2048, FO-165 Argir
Telefon 34 24 00
Ella teldupost: us@us.fo

umhvørvisstovan

*Umhvørvisstovan er ein nýskipaður stovnur, sum fyrisitur lendismál, tinglýsing, fólkaskráir, náttúru- og umhvørvisvernd, viðarvøkstur og frílendi.*

samsir.fo

almannastovan
www.almannastovan.fo



## DAGSTOVNURIN REIÐRIÐ søkir námsfrøðing

Søkt verður eftir einum námsfrøðingi til Dagstovnin Reiðrið á Saltnesi.

Starvið verður sett so skjótt sum gjørligt við einum tímatali um vikuna uppá 30 tímar.

Vit ynskja at tú ert virkin og nýhugsandi, hevur góð samstarvsevni og kanst arbeiða sjálvstøðugt við at loysa uppgávur í samsvari við endamálið hjá stovninum og teimum málsetningum, sum stovnurin hevur.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Hannu Juul, leiðara, á telefon 447003, ella á fartelefelon 215481.

Setanartreytir eru eftir avvarðandi fakfelag.

Skrivlig umsókn skal verða Almannastovuni í hendi í seinasta lagi 3. juni 2008, kl. 12.00.

Send umsóknina til:
Almannastovan
Starvsfólkadeildin
Smyrilsvegur 20
Postboks 3096
110 Tórshavn.

Dagstovnurin Reiðrið er ein dagstovnur fyri fjølbrekað børn og ung undir 18 ár, har møguleiki eisini er fyri umlætting. Endamálið hjá Reiðrinum er at skapa eitt trygt grundarlag fyri børnini, at tey kenna seg væl, verða vird, eru við í sosalari samveru og fáa eitt mennandi tilboð, saman við neyðugu venjingunum. Reiðrið er ein dagstovnur undir Almannastovuni. Á stovninum eru 8 børn og ung.

KREA



# FM í firma fótbóltið

Fyrsta FM – kapping av sínum slag, hvør kann kalla seg fyrsti føroyameistarin í innandurað firmafótbólti? 31. mai 2008 skipar KíF róðrardeildin fyri føroyameistara kapping í firmafótbólti, í ítrottarhøllini í Kollafirði.

Tað eru 5 leikarar á hvørjum liði, tó kann hvørt lið hava ein útskiftara afturat. Um lið eru uppstillaði við leikarum úr Formulakappingini, 1 deild ella 2 deild, so er bert loyvið, at hava ein leikarar úr hesum deildum á hvørjum liðið.

Kostnaðurin fyri luttøku er bert 500,- Nummar 1, 2 og 3 fáa sjálvandi handað heiðursmerkir, ið verða latin av Eik banka. Vinnararnir av kappingini fáa steyp, ið CAJ í Kollafirði letur til ognar. Har afturat hevur Lykke limosine okkurt at bjóða vinnarunum. Í sambandi við kappingina hevur Café Chill serliga leikara menu.

Tilmelding fer fram á 252180 ella 253055. Seinasta freist at boða frá luttøku er mikukvøldið 28. mai.

Høvðusstuðil av kappingini er CAJ.

CAJ

Eik

# HEVUR TÚ EINA GÓÐA SØGU?

22 50 00

TÍÐINDAVAKTIN ALT VIKUSKIFTIÐ

VIVA

